Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Dagfesting: 22-11-2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Fámjinstunnil við tilhoyrandi vegum
(Hækka játtanarkarmin)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 142 frá 4. november 2021 um Fámjinstunnil við tilhoyrandi vegum, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 19. apríl 2022, verður í § 1, stk. 2 “207 mió. kr.” broytt til: “252 mió. kr.”

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Eftir § 1, stk. 2 í løgtingslóg nr. 142 frá 4. november 2021 um Fámjinstunnil við tilhoyrandi vegum, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 19. apríl 2022, er ásett, at byggiútreiðslurnar í mesta lagi kunnu verða 207 mió. kr.

Orsøkin til lógaruppskotið um at broyta verklagslógina er at fáa heimild til at hækka játtanarkarmin til verkætlanina við 45 mió. kr., soleiðis at játtanarkarmurin verður 252 mió. kr.

Fyri at fáa eina hóskandi farleið, verður tunnil við tilhoyrandi vegagerð gjørdur millum Ørðavík og Fámjin. Nýggja farleiðin verður 2,6 km tilsamans. Tunnilin verður umleið 1,2 km langur og 8,5 m breiður. Harumframt skal umleið 1 km av vegi gerast Ørðavíkarmegin, og umleið 400 m av vegi skulu gerast Fámjinsmegin.

Farið varð undir at bora tunnilin í novembur 2022, og skuldi nýggja farleiðin eftir ætlan verða liðug á sumri 2024.

Tilfarið í fjallinum er sera vánaligt, og tvey stór omanlop hava verið í Fámjinstunlinum í ár í sambandi við arbeiðið at bora tunnlin, har stórar nøgdir av gróti eru dottin niður úr loftinum.

Fyrsta omanlopið var í apríl, har 800 rúmmetrar av gróti rapaðu niður úr loftinum, og næsta omanlopið var 9. oktobur, har eini 2000 rúmmetrar fóru niður úr loftinum.
Arbeiðið verður seinkað eini 5 mánaðir. Størri útreiðslur verða til byggipláss, maskinrakstur, verkamenn, útbúnað og tilfar til tunnilin.
Neyðugt er at dekka omanlopið, og at tryggja tunnilin við betongi, stáli, jarni og skúmi, sum bindur tilfarið og annað. Tað eru í løtuni 260 metrar eftir at bora (10. november 2023), og roknast kann við, at serlig trygdaratlit verða tikin, sum eisini hava kostnað við sær.

Landsverk metir, at verkætlanin verður 45 mió. kr. dýrari enn áður mett. Neyðugt verður sostatt at hækka játtanarkarmin í verklagslógini úr 207 mió. kr. til 252 mió. kr. Tað er ein fyritreyt, at játtanarkarmurin er í lagi, soleiðis at Landsverk kann gera fíggjarliga bindandi avtalur fyri írestandi partin av verkætlanini “Fámjinstunnil við tilhoyrandi vegum”.

1.2. Galdandi lóggáva
Galdandi lóggáva á økinum er løgtingslóg nr. 142 frá 4. november 2021 um Fámjinstunnil við tilhoyrandi vegum, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 19. apríl 2022, og er játtanarkarmurin 207 mió. kr.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at fáa heimild til at hækka játtanarkarmin til verkætlanina úr 207 mió. kr. til 252 mió. kr., soleiðis at byggiútreiðslurnar samsvara við dagførda kostnaðarmeting.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Einasta broyting er at hækka játtanarkarmin í galdandi verklagslóg.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur ikki verið til ummælis, men er gjørt í samstarvi við Landsverk. Landsverk er tekniski kunnleikin á økinum, og aðrir partar eru ikki í málinum. Landsverk samráðist beinleiðis við arbeiðstakara.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Eftir § 1, stk. 2 í galdandi løgtingslóg nr. 142 frá 4. november 2021 um Fámjinstunnil við tilhoyrandi vegum, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 19. apríl 2022, er ásett, at byggiútreiðslurnar í mesta lagi kunnu verða 207 mió. kr. Við lógarbroytingini verður játtanarkarmurin hækkaður við 45 mió. kr., soleiðis at hann verður 252 mió. kr.

Endamálið við verklagslógini er at hava materiella heimild til at kunna gera fíggjarliga bindandi avtalur við arbeiðstakarar og onnur fyri írestandi partin av verkætlanini.

Fyrra omanlopið, sum var í apríl, verður mett at dýrka verkætlanina við eini 15,0 mió. kr. Størra omanlopið, sum var 9. oktobur, verður fyribils mett at kosta 30,0 mió. kr. Har skulu viðurskiftini tó greinast nærri, fyri at kunna staðfesta ein neyvari kostnað.
Tað eru brúktar 41,5 mió. kr. til verkætlanina í árunum 2020 – 2022.

Tøk játtan til nýggju farleiðina til Fámjins er 97,5 mió. kr. í 2023. Tørvur er á eykajáttan upp á 25,0 mió. kr. í 2023 til at fíggja meirkostnaðin og tryggja framdriftina í arbeiðinum. Verður eykajáttan veitt, verður játtanin sostatt 122,5 mió. kr. í 2023.

Eftir at játta eru 88 mió. kr. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2024 verða eftir ætlan 84 mió. kr. játtaðar, og sostatt verður neyðugt at hækka fíggjarlógaruppskotið við 4,0 mió. kr.

Samanumtikið:
2020-2022: 41,5 mió. kr. (staðfest nýtsla)
2023: 122,5 mió. kr. (tøk játtan 97,5 mió. kr. + eykajáttan 25,0 mió. kr.)
2024: 88,0 mió. kr. (íløguætlan)
Tilsamans: **252 mió. kr.**

Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at gera fíggjarliga bindandi avtalur innan fyri játtanarkarmin til at gera nýggju farleiðina til Fámjins.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Sosialar avleiðingar		Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Í § 1 verður heimilað landsstýrismanninum at hækka samlaðu útreiðslurnar til verkætlanina Fámjinstunnil við tilhoyrandi vegum við 45 mió. kr., úr 207 mió. kr. til 252 mió. kr.

Við í hesum eru allar útreiðslur til verkætlanina, allar fyrirreikingar, byggipláss, vegagerð, tunnilsgerð og annað í tíðarskeiðinum 2020 – 2024.

Til § 2
§ 2 ásetir gildiskomu.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, 22. november 2023

Dennis Holm (sign.)
landsstýrismaður

/ Elin Mortensen (sign.)

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur